## Hondbóltsútisetarnir vunnu

Mannfólkini og konufólkini, ið spæla hondbólt við ÍF Føroyum, vunnu sínar dystir í gjár. Harrarnir vunnu trygt 20-14 á Rødovre eftir hálvleiksstøðuna 9-8. Serliga skaraði Ári Rouch framúr við sínum seks málum, men eisini í verjupartinum vóru føroysku leikararnir stinnir. Heini Ellingsgaard og Heini Bendtsen gjørdu fimm mál hvør, Leif Hákun Jacobsen trý og Róar Akralíð eitt. ÍF Føroyar hevur nú fýra stig eftir tríggjar dystir og tað merkir, at teir býta oddasessin við eitt annað lið í Seriu 2. Kvinnurnar vunnu eisini sín dyst sannførandi. Mótstøðuliðið var VHC/Vidar, og kvinnurnar vunnu 24-17 á VHC/Vidar. Serliga fyrri hálvleikur var góður hjá føroysku kvinnunum, og í steðginum var støðan 12-3. Í seinna hálvleiki leikaði meiri javnt á, men tað var ongantíð nakar ivi um sigurin. Kvinnurnar hava fýra stig fyri tveir dystir, og eins og menninir býta tær oddasessin við annað lið í deildini.

## Stabæk norskur meistari

Stabæk vann um vikuskiftið norska meistaraheitið í næstseinasta umfari av tippuliguni. Stabæk spældi ímóti Vålerenga, og oddaliðið vann stórsigur 6-2. Íslendski álopsspælarin Veigar Páll Gunnarsson skoraði hattrick, og danski Christian Keller, sum hevur verið millum mest týðandi spælararnar á liðnum í ár, skoraði seinasta málið í dystinum. Frederiksstad var í hølunum á Stabæk, men nú kunnu teir ikki longur fáa Stabæk aftur.

# Pauli skal standa á odda fyri NSÍ

**Millum nýggju spælararnar verða Jónhard Fredriksberg, sum í summar flutti úr felagnum og aftur til Skála, og Jann Ingi Petersen, sum flytur úr B68 og til Runavíkar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Pauli Poulsen*

Pauli Poulsen verður venjari í NSÍ. Tað veit heimasíða felagsins, nsi.fo, at siga. NSÍ hevði ársveitslu leygarkvøldið, og tá boðaði formaðurin, Andreas Lamhauge, frá, at tað verður hjálparvenjarin tvey seinastu árini, sum nú fer at halda um stýrisvølin.

35 ára gamli skálamaðurin var í síni tíð miðverji í barndómsfelagnum. Hann var hjálparvenjari, tá ið Jóhan Nielsen var venjari á Skála, og tvey tey seinastu árini hevur Pauli verið næsti maður hjá Johan Nielsen í NSÍ.

Í gjárkvøldið varð eisini boðað frá, at Jónhard Frederiksberg nú aftur fer at spæla við NSÍ. Í summar flutti Jónhard yvir aftur í barndómsfelagið á Skála, eftir at hann tað mesta av tíðini hevði sitið á NSÍ beinkinum.

Jann Ingi Petersen, sum hevur verið í landsliðshitanum í heyst, fer næsta ár at spæla við NSÍ. 24 ára saltnesmaðurin, sum higartil bara hevur umboðað barndómsfelagið B68 av føroyskum feløgum, hevur verið sera eyðsýndur.

Tað hevur ljóðað, at KÍ verjuspælarin Milic Curcic, sum áður hevur verið á Skála, nú skal spæla við NSÍ, men hetta hoyrdist einki um í leygarkvøldið. Harafturímóti varð boðað frá, at fýra útlendskir spælarar, sum hava verið í Runavík, ikki fara at halda fram: Milan, Dejan, Aco og Predrag.

Á heimasíðuni verður lagt afturat, at alt verður komið upp á pláss í komandi viku.

Stjørnan-Neistin 29-20 (13-8):

# Stjørnan í serflokki

**Heldur ikki Neistin megnaði at nerta Stjørnuna, sum við tryggum sigri vann seg upp aftur á oddasessin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at hava lænt Tjaldri oddasessin í hálva viku, høvdu kvinnurnar hjá Stjørnuna í gjár mgøuleikan at vinna seg upp aftur á ovastu rók, tá tær tóku móti Neistanum í eini endurtøku av FM-finaluni frá í fjør.

Spenningurin gjørdist tó ikki tann heilt stóri hesaferð, tí longu eftir fyrstu fáu minuttunum hevði heimaliðið lagt sjógv millum seg og Neistan. Og tað var ein munur, sum tær bláu ongan tíð megnaðu at gera tað heilt stóra við.

Eina løtu í seinna hálvleiki royndu tær bláu at toga, og tær fingu minkað munin niður í trý mál, men hetta kostaði eisini nógvar kreftir, og tá so Stjørnan enn einaferð svaraði aftur, var leyst og liðugt.

Enn er kappingin blaðung, og undir øllum umstøðum heldur spenningurin sær, nú talan er um FM-finalu. Men fyrst og fremst tykist spurningurin vera, um tað verður VB, Neistin ella Tjaldur, sum skulu fylgja Stjørnuni í finaluna. Sjálvandi kunnu skaðar og onnur fyribrigdi arga oddaliðið, men styrkismunurin niður til VB og Neistan tykist í øllum førum vera av slíkum slag, at hesin ikki verður skorin burtur uttan víðari. Enn eiga tær so til góðar at spæla móti Tjaldri, men tað man vera ivasamt, um tær hava styrkina til at gera so øgiliga nógv við Stjørnuna heldur.

### FAKTA um dystin

**Stjørnan-Neistin 29-20 (13-8)**
**10 min:** 7-2
**20 min:** 11-6
**40 min:** 18-14
**50 min:** 24-18
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Anna Kristina Samson 6, Una Olsen 6, Durita Ljósstein 5(4), Simona Petersen 4, Bára S. Klakstein 3, Durita Mikkelsen 2, Joan M. Djordjevic 2, Durita Christophersen 1
**Neistin:** Trine M. Olsen 9(2), Nicoleta R. Hansen 5(2), Anna Kildevæld 4(1), Unn Kragesteen 1, Heidi Maria Akselsen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 5, Neistin 8
**Útvísingar:** Stjørnan 2, Neistin 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen



# Landsliðið er til reiðar

Mikukvøldið spælir føroyska manslandsliðið í hondbólti á heimavølli móti Serbia. Dia Midjord, landsliðsvenjari, hevur nú gjørt endaliga av, hvørjar spælarar hann vil hava í hópinum.

Dysturin mikukvøldið byrjar klokkan 19, og hósdagin leggur landsliðið so leiðina til Sarajevo, har seinni dysturin móti Serbia skal spælast.

**Málverjar**
Jens Skipagøta, H71
Lars L. Black, TMS Ringsted

**Útispælarar**
Heini Hanusarson, Ajax København
Dánjal Torgarð, H71
Janus Sørensen, H71
Regin Joensen, H71
Sámal Joensen, VÍF
Tróndur Kragesteen, Neistin
Carl Herup Olsen, Neistin
Ingi Olsen, Neistin
Áki Mørk, Neistin
Finnur Hansson, Neistin
Mortan Hansen, StÍF
Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil

**Høvuðsvenjari:** Dia Midjord
**Hjálparvenjari:** Kári Nielsen
**Liðleiðari:** Jákup Durhuus
**Fysioterapeut:** Beinta Sørensen

*Talan var um framúr undirhald, tá Føroyar í vár spældu móti Serbia, og vónandi verður støðan tann sama mikukvøldið*

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 85 | 58 | 27 | 6 |
| 2 Tjaldur | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 73 | 62 | 11 | 5 |
| 3 VB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 87 | 74 | 13 | 4 |
| 4 Neistin | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 75 | 71 | 4 | 3 |
| 5 StÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 90 | -23 | 0 |
| 6 Kyndil | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 51 | 83 | -32 | 0 |